# Framvegis eingin loysn á trygdarviðurskiftunum í Vágatunnlinum

**Nú bara góðar fimm vikur eru til tunnilin um Vestmannasund skal lata upp, eru trygdarviðurskiftini í og við tunnilin framvegis ikki komin í rættlag. Stjórin í P/F Vágatunnilin hevur í eina tíð tosað um eina fyribilsloysn, men heldur ikki henda er í eygsjón enn.**

TUNNILSTRYGD
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Enn røkist einki fyri nakrari loysn á, hvussu trygdarviðurskiftini í samband við tunnilin um Vestmannasund, sum eftir ætlan skal takast í nýtslu týsdagin 26. november, kunnu lúkast.

Fleiri trygdarkrøv eru til undirsjóvartunnilin, bæði inni í sjálvum tunnlinum og báðu megin tunnilin, serliga í samband við til-búgving og bjarging, skuldi ein vanlukka hent niðri í undirsjóvartunnilinum. Tað er fyrst og fremst Brunaumsjón Landsins, ein stovnur undir landsverkfrøðingin-um, sum ásetur trygdarkrøvini til tunnilin. Fríggjadagin var fundur millum Brunaumsjónina og leiðsluna í P/F Vágatunnilin, men eftir tann fundin ber til at staðfesta, at enn er greiða ikki fingin á trygdarspurninginum.

Tað hevur í eina tíð verið greitt, at skotbráið til at finna eina varandi loysn uppá trygdarspurningin í tunnilinum undir Vestmannasundi er alt ov stutt, skal tunnilin latast upp 26. november. Millum annað skulu brandbilar vera tøkir báðu megin tunnilin, men her hevur ivi serliga stungið seg upp um, hvør skal gjalda fyri bilin í Vágum, Miðvágs- og Sandavágs kommunur, sum hava felags sløkkilið, ella rokningin fyri bilin skal gjaldast av P/F Vágatunnilinum. Eftir at tað gjørdist greitt, at skotbráið til at fáa eina varandi loysn á trygdarviðurskiftunum í rættlag var ov stutt, boðaði stjórin í P/F Vágatunnilin, Dávid Reinert Hansen, frá, at felagið fór at leggja seg eftir at finna eina fyribilsloysn á trygdarspurninginum, so tunnilin kann lata upp sum ætlað. Og tað er hesa fyribilsloysn, sum leiðslan fyri P/F Vágatunnilin og Brunaumsjón Landsins samráðast um.

Dávid Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunnilin, hevur ikki stórvegis viðmerkingar til, hvat tað ítøkiliga er, sum skilir partarnar.

- Arbeitt verður í løtuni við eini hóskandi fyribilsloysn á trygdarspurninginum, og fleiri møguleikar verða kannaðir, sigur Dávid Reinert Hansen, sum tó ikki vil koma nærri inn uppá, hvørjir hesir møguleikar eru. Hann leggur afturat, at í hesum sambandi er P/F Vágatunnilin biðið um at útvega fleiri upplýsingar, sum skulu liggja til grund fyri eini fyribilsloysn, og tað fer felagið nú at gera.

Brunaumsjón Landsins er stovnur undir Landsverkfrøðinginum. Oyvindur Brimnes, landsverkfrøðingur sigur, at Brunaumsjónin hevur sett upp eitt niveau fyri, á hvørjum støði trygdin í og við undirsjóvartunnilin skal vera. Hann greiðir frá, at P/F Vágatunnilin hevur í brævi til Brunaumsjónina nevnt nakrar fyribilsloysnir uppá, hvussu trygdarkrøvini kunnu lúkast. Og tað eru hesar fyribilsloysnir, sum Brunaumsjónin vil hava nærri útgreinaðar. Tí metir hann fundin fríggjadagin fyrst og fremst sum ein kunnandi og avklárandi fund.

- Vit hava sett eitt niveau fyri, á hvørjum støði trygdin í tunnlinum skal vera, og kravið til eina og hvørja fyribilsloysn er, at trygdin má vera tann sama, sigur Oyvindur Brimnes. Hvussu útgerðin verður útvegað og hvør skal gjalda fyri hana, er ikki ein spurningur fyri Brunaumsjónina, men fyri P/F Vágatunnilin og kommunurnar báðu megin undirsjóvartunnilin, leggur hann afturat.

Oyvindur Brimnes vil ikki vísa aftur, at Brunaumsjónin kann gera undantøk frá upprunakrøvunum til trygdina í tunnlinum, m.a. í samband við eina fyribilsloysn.

- Í summum førum kann ein loysn viga upp ímóti eini aðrari, men tað krevur í hvørjum einstøkum føri eina fakliga meting, sigur Oyvindur Brimnes, sum leggur dent á, at úrslitið má ikki vera, at samlaða trygdin gerst verri.

Leiðslan fyri P/F Vágatunnilin skal í næstum aftur á fund við kommunurnar við báðar tunnilsmunnarnar, og tá verður Brunaumsjónin væntandi eisini við.

### Letur upp 26. november

Hóast spurningurin um trygdina í undirsjóvartunnilinum er framvegis er ógreiður, heldur stjórin í P/F Vágatunnilin, Dávid Reinert Hansen, fast um, at tunnilin sum ætlað kann takast í nýtslu týsdagin 26.november.

- Vit hava í løtuni onga orsøk til at útseta henda dato, sigur Dávid Reinert Hansen, sum tó ásannar, at trygdarviðurskiftini mugu fáast í rættlag innan heilt stutta tíð, skal málið røkkast. Tí sjálvt um talan er um eina fyribilsloysn, so kann hon neyvan fáast at virka frá dag til degi, leggur hann afturat. Dávid Reinert Hansen hevur heldur ikki nakað boð um, nær ein endalig loysn á trygdarviðurskiftunum í og við Vágatunnlinum kann væntast at vera komin at virka.

Dávid Reinert Hansen sigur, at arbeiðið í samband við Vágatunnilin gongur sum ætlað. Bummskipanin, sum skal nýtast til at krevja inn pengar frá fólki fyri at nýta tunnilin, verður í hesum døgum framleidd og roynd í Norra, og umleið tvær vikur áðrenn tunnilin verður tikin í nýtslu, verður skipanin sett upp á vágalandinum.



*Dávid Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunnilin, lovar, at undirsjóvartunnilin verður klárur at taka í nýtslu sum ætlað, 26.november*



*Flestu munnu minnast fyrsta skotið til fasta sambandið um Vestmannasund. Nú bara góðar fimm vikur eru til undirsjóvartunnilin skal takast í nýtslu, er greiða framvegis ikki fingin á trygdarviðurskiftunum í samband við tunnilin*



# Vit hava skyldu til at selja Fiskavirking til hægstbjóðandi

**– Men tað eru politikararnir, sum smíðja karmarnar um vinnulívið, og tað eru teir, sum gera av, um útlendingar skulu eiga lut í føroysku framleiðsluvinnuni, sigur nevndarformaðurin í Framtaksgrunninum, Niels Winther Poulsen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

»Vit hava ongan skund við at privatisera Føroya Fiskavirking, men støðan hjá grunninum er púra greið: Fiskavirking skal seljast undir einum til hægstbjóðandi«.

Soleiðis segði nevndarformaðurin í Framtaksgrunninum, Niels Winther Poulsen, við Sosialin, 15. oktober.

Í sama blaði segði fyrrverandi nevndarformaðurin í grunninum, Sverri Hansen, at Fiskavirking er ein væl rikin fyritøka við góðari leiðslu, sum ikki kann vera betur.

Hann helt tí, at rættast hevði verið at latið fyritøkuna fingið frið í nøkur ár, soleiðis at hon kundi sloppið at ment seg enn meira.

Niels Winther Poulsen er púra samdur við Sverra um, at Fiskavirking er ein væl rikin fyritøka við góðari leiðslu.

– Men tað er greitt, at fyritøkan skal privatiserast og seljast til hægstbjóðandi. Í reglugerðini fyri grunnin stendur, at grunnurin skal avhenda íløgurnar, tá ið tær eru sølubarar. Hesum arbeiða vit fram ímóti, og fundir hava verið um hesi viðurskifti.

Spurdur, sigur nevndarformaðurin seg ikki vilja siga, at allir partar í málinum eru samdir í øllum.

– Men so vítt eg veit, er semja millum nevnd og stjórn um, at vit skulu arbeiða fram ímóti eini privatisering av Fiskavirking – í friði og náðum.

Stjórin í Føroya Fiskavirking, Meinhard Jacobsen, hevur nevnt, at umráðandi er, at fyritøkan fær arbeiðsfrið, soleiðis at fólkið, sum arbeiðir á virkjunum kring landið og keyparar uttanlands, ikki skulu órógvast óneyðugt av kjakinum um privatisering.

Í samrøðuni við Sosialin, 15. oktober, helt Niels Winther, at tað besta fyri Fiskavirking hevði verið ein privatisering, soleiðis at fyritøkan fekk betri arbeiðsfrið.

### Ognarviðurskifti

Nevndarformaðurin leggur dent á, at tað er skyldan hjá grunninum, tá ið felagið verður selt, at tað verður selt til hægstbjóðandi.

Hetta reisir spurningin, hvørt peningasterkir útlendingar kunnu stinga av við hesi fyritøku, sum er bygd upp til ta vælvirkandi fyritøku, hon nú er.

– Hvussu ognarviðurskiftini skulu verða í føroyskum vinnulívi, er ein reint politiskur spurningur, sum liggur uttanfyri okkara øki. Tað er ikki okkara uppgáva at gera ella broyta reglugerðir og lógir um ognarviðurskifti. Vit fara at arbeiða innanfyri og laga okkum til teir karmar, sum verða galdandi, tá ið tann tíðin kemur.

Nær Fiskavirking verður lýst til sølu, sigur Niels Winther seg slett ikki duga at meta um.

– Tað hevur ongan skund, og áðrenn felagið verður selt, verður sølan fráboðað í góðari tíð, sigur hann.

### Greiðir karmar

Hann heldur tað eisini vera umráðandi, at útlendingar vita, hvørjar møguleikar teir hava, tá ið sølan verður.

– Teir mugu vita, um teir eru vælkomnir ella ikki, sigur Niels Winther og leggur aftrat, at tað tænir okkum øllum best, at karmarnir um vinnulívið eru greiðir.

Hann leggur aftrat, at sum er, kann Framtaksgrunnurin selja felagið til hvønn sum helst, ið hevur hægsta boð.

– Men tað fara vit sjálvsagt ikki at gera, tí enn er tíðin ikki búgvin.

Vinnumálastýrið hevur sett ein bólk at arbeiða við bygnaðinum í fiskivinnuni, og hetta arbeiði er ikki liðugt enn.

Nevndarformaðurin, Niels Winther Poulsen, væntar, at ein partur av hesum arbeiði fer siga grunninum, hvat hann hevur at halda seg til, tá ið Fiskavirking skal seljast og privatiserast sambært reglugerðini hjá grunninum.



*Nú verandi og fyrrverandi nevndarformenninir í Framtaksgrunninum, Niels Winther Poulsen og Sverri Hansen (mynd), eru samdir um, at Fiskavirking hevur eina góða leiðslu og er væl rikið. Men teir eru eftir øllum at døma ikki heilt samdir um privatiseringina – Latið felagið fáa frið í nøkur ár, sigur Sverri Hansen.*



*– Tað er greitt, at Fiskavirking skal privatiserast og seljast til hægstbjóðandi. Í reglugerðini fyri Framtaksgrunnin stendur, at hann skal avhenda íløgurnar, tá ið tær eru sølubarar, sigur Niels Winther Poulsen, nevndarformaður*


